# HÚS TIL SØLU



**Um hóskandi boð fæst, eru tvíhús á Mækjugøtu 10, Tórshavn, til sølu.**

Húsini eru frá 1992 og hava 3 hæddir. Kjallari og miðhædd eru 67 m2 og loftið 54 m2. Hava gott útsýni.

**Myndir og fleiri upplýsingar eru at finna á:**
www.123hjemmeside.dk/tilsolu
ella á tlf. 794289.

## Sp/f Stoyping

Verður hervið lýst til sølu
Við forskalling, amboðum, vørubili o.a.

Meiri fæst at vita við at venda sær til:
**stoyping@stoyping.fo**
**tlf: 596300 ella 596301**

## Jørð í Hvalba til sølu

Matrikkulnummar 51 a, Hvalba, sum eru lutirnir

1. Heiðatrøðin, 13.805m2
2. Trøð úti í Nesi 2.996 m2,

Við tilhoyrandi uttangarsrættindi í hagapartinum Fjórðingur, 10 gl. 11 skinn, er til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Telefon 27 24 21/22 35 66**

## Til sølu/leigu

Vinnubygningur, Slættanesgøtu 8
til sølu/leigu frá 1. juni.

Vælegnaður til goymslu ella bilverkstað.

***Áhugaði kunnu ringja á tlf: 21 34 94, eftir kl. 18.00.***

# Leiðari

## Dagstovnurin Birkilund søkir eftir leiðara 40 tímar um vikuna, at byrja 1. juli 2011 – ella eftir avtalu

Dagstovnurin Birkilund er ein sjálvsognarstovnur, stjórna av eini 5 manna nevnd.
Dagstovnurin Birkilund er ein stórur stovnur, ið hýsur 3 vøggustovustovur við 12 børnum á hvørjari, 3 barnagarðsstovur og eina skúlastovu, har tey elstu børnini á stovninum halda til.
Í løtuni eru 107 børn á stovninum. Starvsfólkini eru um 26 í talið, av teimum eru 12 pedagogar.

**Vit bjóða**
- eitt áhugavert og spennandi starv, har tú sleppur at verða við til at mynda títt dagliga arbeiði og gerandisdagin hjá børnunum.
- Vit liggja í einum náttúruríkum umhvørvi tætt við Hoyvíkstjørn og við øllum sniðgøtunum á Konmansmýru.
- ein stóran og spennandi bygning við hópin av møguleikum
- møguleika fyri eftirútbúgving
- at tú verður partur av einum netbólki, sum kommunan skipar fyri millum dagstovnaleiðarar

**Vit vænta at tú**
- er útbúgvin pedagogur og hevur leiðsluroyndir
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir
- hevur hugsjónir um virksemi á einum dagstovni
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum
- hevur góð evni at umstilla teg í einum broytiligum umhvørvi
- er kveikjandi og megnar at eggja starvsfólkunum at gera sítt besta
- sær møguleikar framum forðingar
- hevur evni og áræði at ganga nýggjar leiðir
- kanst virka í góðum samstarvi við nevnd, starvsfelagar og foreldur
- dugir væl at samskifta og hevur lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum
- hevur teldukunnleika á brúkarastøði
- vil verða við til at menna stovnin og arbeiða við tí, vit seta okkum sum mál.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag. Lønt eftir lønarstigunum 26 til 32.

**Umsókn**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera sent:
Dagstovninum Birkilund
Hoyvíksvegur 41 B
100 Tórshavn
í seinasta lagi 23. mai 2011.
Viðmerkjast skal „umsókn til leiðarastarvið""

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Katrin Bjarnadóttir, stovnsleiðara á tlf 215458 ella Boga Simonsen, nevndarlim á tlf 214008

**Dagstovnurin Birkilund**
Hoyvíksvegur 41 B
FO – 100 Tórshavn

## Aðalfundur

Aðalfundur verður í Deyvahúsinum, Íslandsvegur 10b, Tórshavn.
**Hósdagin 26. mai kl. 19.00**

Skrá sambært viðtøku felagsins

**Ættarbandið**



# VÆLHILDIN RAÐHÚS Í HOYVÍK

Um hóskandi boð fæst verða raðhúsini Maritugøta 14 við hesum lýst til sølu.

Húsini er innrættaði í tveimum hæddum, har hvør hæddin er 57 m2.

Húsini, sum liggja í friðaligum umhvørvi eru bygd í 2003. Skamt frá húsunum er stórt spælipláss, venjingarvøllur, skúli og dagstovnur.
Frá húsunum er frálíkt útsýni oman móti Hoyvíkar Kirkju.

**Húsini eru innrættaði soleiðis:**
**Niðara hædd:** gongd, goymslurúm undir trappuni, WC, køkur og stova (dragihurð er millum køk og stovu). Hjallur/úthús hoyrir til húsini.
**Loftshædd:** gongd, baðirúm við brúsu og baðikari og 3 kømur
**Ovastaloft:** stórt goymslurúm, har størri parturin hevur álagt gólv.

Seljararnir eru møguliga áhugaðir í at býta um við størri hús, helst í Hoyvík.

Fleiri fotomyndur eru tøkar á heimasíðuni www. advokatvirkid.fo

Áhugaði kunnu venda sær til skrivstovu okkara.

**Advokatvirkið**
**Páll Nielsen**
**Sigmund Poulsen**
**Eyðhild Skaalum**
**Hans Trygvi Teirin**

Skansavegur 1
Postsmoga 85
110 Tórshavn
Tlf. 31 21 71
fax 31 58 74
pall@advokatvirkid.fo